Starvslýsing

Heimatænastan

## Økisskrivari til Heimatænastuna Vágar/Norðstreymoy

Søkt verður eftir starvsfólki til økisskrivstovuna í Heimatænastuni at byrja 1. februar 2009 ella skjótast tilber, at arbeiða fulla tíð ella eftir nærri avtalu. Økisskrivsovan, sum liggur í Miðvági, virkar sum sambindingarrlið millum brúkaran, starvsfólkið, meginskrivstovuna og aðrar stovnar.

**Høvuðsuppgávurnar eru umframt vanligt skrivstovuarbeiði, at**
- Taka telefon
- Gera lønir
- Gera arbeiðsætlanir
- Samskipa arbeiðið hjá heilsuhjálparunum í Vágum

**Fyrimunur er, um tú**
- Hevur viðkomandi útbúgving og fyrisitingarligar royndir
- Hevur áhuga í at arbeiða við lønar- og starvsfólkaviðurskiftum
- Hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- Hevur góðan telduførleika
- Er fleksibul, hevur evni at læra nýtt og at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Tolir møguligar bygnaðarbroytingar

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum og nógvum samskifti inn- og úteftir
- Eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 762201.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum v.m. verður at senda til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreym
Økisskrivstovan, Hornavegur 12
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 23. januar 2009 kl. 15.00**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

STARV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til G4

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopedi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum-, gynekologiskum-, eygna-, oyrna-, nasa- og hálssjúkum. Á deildini er pláss fyri 22 sjúklingum, umframt 12 pláss á A3.

**Vit søkja sjúkrarøktarfrøðingar til:**
- eitt tíðaravmarkað starv í kvøldvakt á starvsbrøki 0,7 til setan 1. februar 2009 ella so skjótt til ber og árið út
- tvey tíðaravmarkað størv vegna barnsburð í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,7 til setan 1. februar 2009 ella so skjótt til ber

**Krøv til umsøkjararnar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligur áhugi og royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og jalig/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 304500 til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, lokal 5064 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 23. januar 2009 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingur til B7

Vit søkja eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi í fulltíðarstarv í skiftandi vaktum til setan 1. februar 2009 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

B7 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum hevur hesar sergreinar: Lungnamedisin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi. Tvørfaklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini heldur fram. B7 er eisini byrjað við tvørfakligari konferensu hvønn morgum. Aðrar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS.

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jónu Sigmundardóttir, deildarleiðara á B7 á tlf. 304500, lokal 6067.

**Umsóknarfreistin er 26. januar 2009 kl. 12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við



ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!